# Útisetarnir aftur við í kappingini

**Eftir at tað tey seinastu árini hava verið fáir útisetar at velja ímillum, eru møguleikar nú fyri, at teir, sum spæla uttanfyri landoddarnar, aftur fara at fjølgast á landsliðnum, men tað er ikki sjálvsagt, at útisetar skulu eiga pláss á landsliðnum**



**Jóannes Hansen**
*joannes@sosialurin.fo*

Skal talan vera um framgongd, og skal landsliðið harvið røkka longri fram á altjóða styrkislistanum, so er tað alneyðugt, at tað verða fleiri spælarar, sum viku eftir viku eru í størri avbjóðing, enn teir eru í føroysku kappingini.

Hetta var ein av niðurstøðunum, sum Allan Simonsen gjørdi sær, tá ið hann hevði havt ábyrgdina av landsliðnum í fyrstu EM undankappingini. Áskoðanin hjá Allani var, at bestu føroysku liðini ikki nóg ofta vóru undir so stórum trýsti, at tað av álvara skerpaði og harvið menti landsliðsspælararnar, soleiðis at teir harvið vórðu betri fyrireikaðir at standa ímóti stóra altjóða trýstinum.

Tey átta árini, sum Allan hevði ábyrgdina av landsliðnum, var gongdin leingi tann, at alt fleiri føroyingar royndu seg í útlendskum feløgum. Tað sást aftur í talinum á útisetum á landsliðnum. Eitt nú vóru tíggju av teimum sekstan spælarunum, sum vóru á vøllinum í vinardystinum ímóti Danmark á Tórsvølli (0-2) 16. august í 2000, útisetar. Teir flestu av hesum sekstan vóru upp á tað besta, tá ið teir spældu ímóti Danmark. Um teir høvdu verið eins góðir, um teir tá høvdu umboðað føroysk feløg, mundi í onkrum førum vera ivasamt.

At spæla á hægsta støði í Íslandi, Noregi og Danmark bar betri kropsligan førleika við sær. Bóltkunnleikin mundi eisini vera betri, tí spælararnir í feløgunum vandu á undirlagnum, sum landsdystir vórðu spældir á.

### Niður í einki og so uppaftur

Tað hevur einki við annan ella hin landsliðsvenjaran at gera. Tað er ein veruleiki, at talið á føroyskum fótbóltspælarum í útlendskum feløgum minkaði nógv um ta tíðina, tá ið Henrik Larsen tók við venjarastarvinum.

Tá ið Føroyar vóru í hígartil størstu royndini á útivølli, var útisetatalið heilt lítið. Størsta avbjóðingin hígartil á útivølli var, tá ið Føroyar spældu í Týsklandi. 16. oktober í 2002 var Jákup Mikkelsen einsamallur útiseti millum teir fyrstu ellivu. Síðstu tólv minuttirnar var Christian Høgni Jacobsen eisini á vøllinum.

Tað ber ikki til at siga, at avrikið og úrslitið var lakari, tí at útisetarnir vóru so fáir. Ímóti spælarum, sum næstan bara umboðaðu feløg í føroysku kappingini, vann Týskland 2-1, og tað var um reppið, at Hjalgrím Elttør javnaði til 2-2!

Hetta síðsta árið er útisetatalið støðugt økt. Julian Johnsson, Fróði Benjaminsen og Hans Fróði Hansen eru í Íslandi, í Danmark er talið so stórt sum ongantíð áður, og í sjálvum Arsenal er Ingi Højsted einasta føroyska umboðið í móðurlandinum hjá fótbóltinum.

Talið á tjóðum, sum føroyingar royna seg í uttanfyri landoddarnar, er minkað nakað. Føroyingar hava áður roynt seg í Hollandi, Noregi og Skotlandi, men í løtuni eru eingir føroyingar í hesum kappingunum.

### Marginalirnir

Tað eru tíggju ár síðani, at Allan Simonsen tók við sum føroyskur landsliðsvenjari, og eitt sindur styttri síðani, at hann metti tað vera neyðugt við fleiri útisetum.

Allan vildi vera við, at úrslitini fóru at gerast betri, um útisetarnir gjørdust fleiri. Í fjør og í fyrraárið vóru útisetarnir fáir. Men úrslitini vóru ikki nógv øðrvísi, enn tey høvdu verið. Føroyar taptu fimm undankappingardystir í fjør, og Føroyar vunnu tvær ferðir í vinardystum ímóti Kasakstan. Tað ber til at spæla við tann møguleikan, at úthaldnið hevði havt verið eitt vet størri, um fleiri útisetar høvdu havt verið á liðnum. Tað kundi kanska havt við sær, at tað hevði havt borið til at hildið tørn um javnleikir, sum í síðstu løtu gjørdust til tap. Her verður eitt nú hugsað um tey bæði 2-1 tapini ímóti Íslandi og 2-0 tapið á heimavølli ímóti Týsklandi.

Tað ber til at hugsa og tosa um hetta, men svarið verður hangandi í luftini. Veruleikin er og verður, at marginalirnir vóru ikki við, tá ið tað ráddi mest um, og tað komst neyvan heilt av ongum, at tað koppaði teimum professionellu til fyrimunar og ímóti amatørunum, sum eru meiri vanir við graslíki enn gras, og sum hava arbeiði og mangt annað at hugsa um.

### Royndu menninir

Aðra staðni er tað ikki ókent, at spælarar, sum hava verið farnir um besta fótbóltsaldur, hava staðið seg betri á landsliðnum enn nakrantíð. Allan Simonsen er gott dømi um hetta. Meðan hann spældi í Týsklandi og Spania vóru krøvini so mikið stór, at tað tóktist torført hjá honum at liva upp til tað, hann vísti í feløgunum, tá ið hann umboðaði Danmark. Tá ið Allan kom aftur til Danmarkar og Vejle, spældi hann betri á landsliðnum, enn hann nakrantíð hevði gjørt.

Fleiri fyrrverandi útisetar eru framvegis landsliðstøkir. Eitt nú Jens Martin Knudsen, Jákup Mikkelsen, John Petersen og Óli Johannesen. Liðformaðurin er aftur í TB. Tað hevur verið nevnt, at hann mundi fara at hava ilt við at standa seg, tí hann er farin at eldast, og at avbjóðingarnar í gerandisdegnum ikki fóru at verða nóg stórar. Hvussu tað fer at verða við hesum, fer tíðin at vísa. Á venjingarleguni hjá landsliðnum í Spania vísti Óli Johannesen, at hann avgjørt ikki ætlar at leggja árarnar inn.

### Útisetar valdast

Spurningurin er, hvussu samansetingin millum ungar og eldri spælarar er á landsliðnum, og hvussu hon fer at verða millum heimligar spælarar, útisetar og spælarar, sum hava verið útisetar, og sum nú aftur eru í Føroyum.

Tað verður dygdin og ikki, um spælararnir eru ungir ella eldri, og útisetar ella ikki útisetar, sum fer at gera av, hvørjar spælarar, venjarin fer at kjósa sær. Millum útisetarnir eru fleiri, sum eru sjálvskrivaðir á landsliðnum, um teir eru upp á sítt besta. Dømi um hetta eru Jákup á Borg og Jón Rói Jacobsen, um tað fer at eydnast honum at koma heilt fyri seg eftir álvarssama skaðan. Tað er heldur einki at ivast í, at Ingi Højsted aftur fer at verða við í kappingini um miðvallarplássini, um hann støðugt fer at venja og spæla í Arsenal. Julian Johnsson, Fróði Benjaminsen og Hans Fróði Hansen verða eisini væl fyri, um teir fara at spæla hvørja viku í bestu deildini í Íslandi.

Hvussu tað verður við spælarunum í næstbestu donsku deildini, fer tíðin at vísa. Í Spania í vetur vísti Johan B. Hansen, at hann var væl fyri. Í vár hevur tað verið eitt sindur inn og út hjá honum í AC Horsens verjuni. Christian Høgni Jacobsen er fastur maður í Vejle álopinum, og hann tykist vera fyrsta valið hjá Henrik Larsen. Ian Højgaard hevur ongantíð verið á landsliðnum, meðan hann hevur verið fastur maður í NSÍ. Nú er hann eykamaður í Vejle og tískil er tað ikki serliga sannlíkt, at Henrik Larsen fer at senda boð eftir honum.

Fýra føroyingar eru í Fremad Amager. John Heri Dam hevur ongantíð verið á landsliðnum. Tað hava Jann Ingi Petersen, Hjalgrím Elttør og Andrew av Fløtum. Um teir fara at megna at vinna fast pláss á liðnum í 1. deild og harvið hvørja viku frá mitt í mars og til síðst í november fara at spæla á grasi og við fleiri øðrar at kappast um plássini á liðnum, so fer tað at betra fyritreytirnar hjá teimum at umboða føðilandið. Og so er tað Christian Lamhauge Holst, sum framvegis er í 2. deild og Lyngby.



